

Annita á Fríðriksmørk
*forkvinna í tingbólki Tjóðveldis*

# »Tjóðveldi skiftir ikki Heina O Heinesen út«

Í sambandi við arbeiðið at endurskoða valskipanina skulu veljast tveir bólkar:

- ein serfrøðingabólkur og
- ein politiskur fylgibólkur.

**Hendan støðan, sum vit koma í innímillum har politiskir fylgibólkar verða mannaðir bara við tí eina kyninum er óheppið**

### Politiskir fylgibólkar

Nøkur, eisini fjølmiðlar, hava spurt, hví Tjóðveldi ikki valdi eina kvinnu í politiska bólkin, sum skal fylgja arbeiðnum hjá serfrøðingabólkinum, sum skal fyrireika uppskot til nýggja vallóg. Hetta kom m.a. fram í grein í Sosialinum í vikuskiftinum, sum bar yvirskriftina "Tjóðveldi skiftir ikki Heina O Heinesen út".

Tað eydnaðist Tjóðveldinum at hava bestu kynsjavnvágina á Løgtingi til seinasta løgtingsval. Og við somu javnstøðu fyri eyga hava vit tað prinsipp, at framsøgufólkið í tí máli, sum fylgibólkur skal fylgja, umboðar Tjóðveldi í tí aktuella bólkinum. Tað gjørdu vit eisini í hesum føri, tá umboð fyri flokkin skuldi veljast í omanfyri nevnda politiska fylgibólk. Tí er Heini O Heinesen okkara umboð í bólkinum.

Um javnstøða skuldi verðið í øllum teimum politisku fylgibólkunum, sum verða mannaðir við umboðum úr hvørjum flokki, vildi tað merkt, at vit noyddust at skúgva javnstøðuna burtur í tingbólkunum. Okkara flokkur og Javnaðarflokkurin, eru jú teir einastu, sum kunnu velja kvinnur. Og um hesir báðir flokkarnir sum teir einastu skulu tryggja kvinnuliga umboðan, hvørja ferð ein bólkur varð settur, vildi avleiðingin jú verið, at mannligu umboðini í hesum flokkum ongantíð sloppu framat. Og tað kann ikki verða rætt sæð út frá einum javnstøðusjónarmiði.

### Serfrøðingabólkurin

Sambært lóg skal serfrøðingabólkurin lúka treytirnar um javnstøðu. Tað skal politiski fylgibólkurin ikki.

Undirritaða gjørdi formansskapin skrivliga varugan við trupulleikan, tá serfrøðingabólkurin varð valdur upprunaliga, tí hesin tá ikki leik treytirnar í javnstøðulógini. Sum skilst er hetta við at verða komið uppá pláss nú eftirfylgjandi, og er tað at fegnast um.

Lógargreinin í javnstøðulógini, sum tryggjar javnstøðu í serfrøðingabólkinum, er soljóðandi:

§ 8. Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtingsella bý/bygdaráðslimir.

Stk. 2. Tá ið serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.

### Forarbeiðið má byrja í valstríðnum

Hendan støðan, sum vit koma í innímillum har politiskir fylgibólkar verða mannaðir bara við tí eina kyninum er óheppið. Tað er tó ongin ivi um, at hetta kann komast til lívs, um flokkarnir gera sítt heimaarbeiði til lítar longu við valstríðsbyrjan, og longu tá tryggja, at flokkarnir eru nøkulundu javnt umboðaðir í valstríðnum, og at flokkarnir hava ein javnstøðuprofil. Tástani kunnu vit valdagin síggja eitt nøkulunda javnt býti millum kvinnulig og mannlig løgtingsumboð. Eydnast tað, renna vit okkum neyvan í aftur óhepnar støður, sum hana við politisku umboðanini í bólkinum, sum skal fylgja við arbeiðnum hjá serfrøðingabólkinum.

Ingeborg Godtfred

# Summi kunnu oysla

Í kjalarvørrinum av at Almannaráðið hevur fingið boð um at spara á sínum øki, sær tað út til at Vinnumálaráðið hevur fingið boð um at oyðsla á sínum øki. Hetta grundað á, at landsstýriskvinnan í Almannaráðnum í gjár boðaði frá, at sparast skuldi á hennara øki, sum sjálvandi umfatar tey veiku og gomlu í samfelagnum.

Í gjárkvøldið boðaði fjølmiðlarnir frá, at Rúsdrekkasøla Landsins sum hevur leigað frá almennum grunnum, ikki skal flyta inn aftur eftir umvælingina, sjálvt um húsaleigan var nógv minni og goymslan størri.

Kann Føroya fólk fáa eina frágreiðing?

Disse tallene speiler det faktum at Islendingene er mindre interessert i EU for øyeblikket. Vi forventer at EU-forhandlingene kan ta et par år og at resulatet da blir lagt frem for folkeavstemning.

### Havn og tunnel

Transport er viktig for oss og vi setter stor pris på servisen hos Smyril-Line som seiler hver uke mellom Island og Færöyene. Den 20. juli tok vi i bruk en ny havn, Landeyjarhöfn, da bil- og passasjerfergen Herjólfur seilte sin förste tur fra Vestmannaøyene til Landeyjarhöfn utenfor Hvolsvöllur på sørkysten av Island . Før seilte Herjólfur mellom Vestmannaøyene og Þorlákshöfn på 2 timer og 45 minutter. Nå tar turen mellom Landeyjarhöfn og Vestmannaöyene kun 30 minutter. Buss-eller biltur fra Reykjavik til det nye havneleiet tar litt lengre tid, men overfarten til Vestmannaøyene er kortet betydelig ned. Jeg kan i denne sammenheng tilföye at lundefuglstammen i Vestmannaøyene har vært meget svak nå i 5 år på grunn av fødemangel i havet, det er lite sandsíli utenfor kysten. I september åpner vi en ny tunnel, Héðinsfjarðargöng, mellom Siglufjörður og Ólafsfjörður via Héðinsfjörður på nord-Island. Denne tunnel skal bli en ny pulsåre for den gamle "sildebyen" Siglufjörður og byene ved Eyjafjörður.



*Laugardalslaug*



*Héðinfjarðatunnilin millum Ólafsfjørð og Siglufjørð umvegis Héðinsfjørð verður tikin í brúk í september*

### Höyvik-avtalen

Island og Færöyenes utenriksministre, Össur Skarphéðinsson og Jörgen Niclasen, holdt samrådsmøte i Høyvikrådet, i begynnelsen av juli i Torshavn. Höyvikrådet ble etablert med frihandelsavtalen mellom Færøyene og Island, Höyvikavtalen for 4 år siden. På dagsorden var det felles interesser som økt samarbeid mellom landene og EU og EFTA og økt samarbeid om helsetjeneste. Det ble undertegnet en kontrakt om samarbeid mellom utenriksdepartementene som bidrar til støtte og oppbygging av den færøyiske utenrikstjenesten. Höyvikavtalen er den mest omfattende frihandelsavtale som Island har inngått. Den omfatter ikke bare handel i tradisjonell forstand, men skal også bidra til økt samarbeid på områder som omfatter kultur, energi, miljø, helse, telekommunikasjon og turisme.